




Almannastovna søkir eftir

# fíggjar- og fyrisitingarfólki

Stuðulsskipanin fyri børn, er skipan á Almannastovuni, sum veitir stuðul til heimabúgvandi børn og ung, ið bera brek. Stuðulsskipanin fevnir um alt landið. Í skipanini starvast í løtuni uml. 100 fólk. Játtanin fyri 2006 er slakar 17 mió. kr.

Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

Til stuðulsskipanina fyri børn á Almannastovuni verður søkt eftir fyrisitingarfólki.

Vit sóknast eftir einum fólki við viðkomandi útbúgving og royndum. Stuðulsskipanin er ein nýggj skipan, og tú kemur at fáa ein virknan leiklut at byggja upp mannagongdir og at laga fyrisitingarligu amboðini til.

Starvið umfatar í høvuðsheitinum bókhald og avgreiðslu av lønum og setanarbrøvum hjá starvsfólki í stuðulsskipanini, umframt annað vanligt skrivstovuhald. Eisini kemur tú at hava nógv samskifti við stuðulsfólk og foreldur at børnum við breki.

Tað er tí ein treyt, at tú ert virkin og fyrikomandi, hevur sera góðan telduførleika, góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Oyvind av Skarði, deildarleiðara á telefon 35 35 10.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 27. februar 2006, kl. 9.00.

Send umsóknina til:
Stuðulsskipanin fyri børn
Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA.FO · TEL 47 80 80